# Reglur um rusk og burturkast frá húskjum í IRF-limakommunum

Hesar reglur eru samtyktar á aðalfundi felagsins 3. mai 2007

**1. Inngangur**

1.1 Við heimild í *Kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast* og *Viðtøkunum fyri Interkommunala Renovatiónsfelagsskapin L/F* (IRF) verða hesar reglur um móttøku av ruski og burturkasti frá húskjum í limakommununum settar í gildi. Atlit er eisini tikin til niðanfyristandandi lógir og kunngerðir:

- *Løgtingslóg um náttúrufriðing, nr. 48 frá 9. juli 1970*
- *Løgtingslóg um umhvørvisvernd, nr. 134 frá 29. oktober1988*
- *Løgtingslóg um umhvørvisgjald á smyrjiolju frá 13. mai 1992*
- *Kunngerð um umhvørvisreglur, nr. 53 frá 3. mai 1994*
- *Reglugerð um ruskinnsavning frá 1. juli 1994*

**2. Endamál**

2.1 Endamálið við hesum reglum er at tryggja, at rusk og burturkast frá húskjum í limakommununum í IRF verður savnað og viðgjørt á ein tryggan hátt, tekniskt, heilsuliga og umhvørvisliga.

**3. Skipan**

3.1 Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin L/F, stuttstava IRF, er eitt lutafelag, har alla kommunur í Føroyum kunnu gerast lutaeigarar. Felagsskapurin hevur til endamáls at vir fyri, at burturkast og annað órudd verður beint burtur. IRF hevur skyldu til at taka ímóti øllum burturkasti.

3.2 Hægsta vald í felagsskapinum er aðalfundurin. Aðalfundurin velur nevnd við seks kommunustýrislimum fyri eitt valskeið ísenn.

3.3 Nevndin hevur heimild at seta nærri reglur um, hvussu innsavning, burturkoyring og viðgerð verður skipað.

3.4 IRF hevur innsavningarskipan til húsarhaldsrusk, serliga dálkandi burturkast og annað burturkast í limakommununum, sambært *Kunngerð um burturkast* og viðtøkum felagsin

3.5 IRF hevur innsavningarskipan til spilliolju í limakommununum, *sambært Løgtingslóg un umhvørvisgjald á smyrjiolju.*

3.6 IRF er eitt tænastuvirki viðvíkjandi burturkasti hjá kommununum. Tað merkir, at limakommunurnar vísa til IRF, tá tað ræður um innsavning og viðgerð av ruski og burturkast

3.7 Vísandi til kunngerð um burturkast merkir tað, at borgarar og virki hava skyldu at lata sí burturkast til IRF eftir teimum reglum, sum til eina og hvørja tíð eru galdandi.

**4. Reglurnar umfata**

4.1 Hesar reglur eru galdandi fyri øll húski í kommunum, sum eru limir í IRF.

4.2 Reglurnar eru galdandi fyri innsavning og viðgerð av øllum ruski og burturkasti, sum stavar frá vanligum húsarhaldi.

4.3 Burturkast frá nýbygging og størri umvælingum av sethúsum, úthúsum og líknandi verðu roknað sum vinnuligt burturkast. Víst verður til Reglur um burturkast frá virkjum í IRF-limakommunum

4.4 Um nýggjar skipanir verða royndar, kann IRF seta serstakar fyriskipanir í verk í ávísum kommunum. Viðkomandi kommunur skulu kunnast og hoyrast, áðrenn skipanin verður s í verk. Hesar fyriskipanir verða fastlagdar í fylgiskjølum til reglunar.

4.5 Reglurnar viðvíkja ikki:

- mold, grót, betong o.l. frá byggivirksemi
- serliga oxiderandi burturkasti
- spreingievni
- fýrverki

**5. Allýsingar**

5.1 Húski: Fólk, sum búgva í somu í sethúsum. Harafturat er eitt húski eisini fólk, sum búgv somu íbúð í sethúsum, raðhúsum ella øðrum bústaðarskipanum. Bústaðirnir skulu lúka treytirnar í kommunalu byggisamtyktunum.

5.2 Sethús: Hús, íroknað tvíhús við egnum matr. nr., sum verður brúkt til bústað.

5.3 Raðhús: Hús við egnum matr. nr., ið er samanbygt við fleiri hús í eini røð, og sum verðu brúkt til bústað hjá í mesta lagi einum húski.

5.4 Íbúð: Sjálvstøðugur bústaður í sethúsum, raðhúsum v.m., sum verður brúktur til bústað h einum húski.

5.5 Eigari: Tann, sum sambært tinglýsingini eigur føstu ognina.

5.6 Rusk: Leivdir og smálutir, sum dagliga verða koyrdir burtur, og sum ikki kunnu endurnýtast /endurvinnast ella eru serliga dálkandi.

5.7 Burturkast: Størri lutir og húsgøgn, sum bert verða koyrd burtur.

5.8 Vinnuligt burturkast: Víst verður til *Reglur um burturkast frá virkjum í IRF-limakommunum.*

5.9 Innsavningarskipan: Skipan, har rusk verður heintað frá húskjum. IRF hevur ábyrgdina a at innsavningarskipanin virkar sambært *Kunngerð um burturkast*.

5.10 Avhendingarskipan: Skipan, har kommunan vísir á móttøku, sum húski kunnu lata burturkast til eftir ávísum treytum. Kommunan hevur ábyrgd av, at móttøkan verður rikı sambært hesum reglum.

5.11 Støða: Staðið á ogn, har ruskposastativ stendur.

5.12 Flutningsvegur: Gonguteinur millum støðu og atkomuveg til ognina.

5.13 Grái posin: Posi við IRF áskrift til rusk, sum skal brennast, frá dagliga húsarhaldinum.

5.14 Grái eykaposin: Posi, ið fæst til keyps við IRF áskrift til rusk, sum skal brennnast, frá dagliga húsarhaldinum.

5.15 Hvíti posin: Posi við IRF áskrift til pappír og papp, sum er ætlað til endurnýtslu.

5.16 Reyði posin: Posi við IRF áskrift til serliga dálkandi burturkast.

5.17 Ruskinnsavnari: Starvsfólk hjá IRF, sum heintar posar frá húskjum.

5.18 Burturkastmóttøka: Kommunalt pláss, sum tekur ímóti ruski og burturkasti frá borgarum (bingjupláss, endurnýtslupláss).

5.19 Burturkastflokkar: IRF ger av, hvussu rusk og burturkast verður flokkað. Víst verður til Fygiskjal 1.

**6. Skyldur borgaranna**

6.1 Húski í limakommununum hava skyldu at skilja rusk og burturkast samsvarandi teimum skipanum, sum eru ella verða settar í verk av IRF, sambært *Kunngerð um burturkast* og viðtøkum felagsins.

6.2 Húski í limakommununum hava skyldu til at nýta tær innsavningarskipanir, sum eru ella verða settar í verk av IRF.

6.3 Húski í limakommunu hava skyldu til at nýta tær avhendingarskipanir, sum eru ella verð settar í verk av kommununum sambært *Kunngerð um burturkast*.

6.4 Brenning av burturkasti er ikki loyvd uttan loyvi frá Heilsufrøðiligu Starvstovuni sambæ *Kunngerð um burturkast*.

**7. Innsavningarskipan til húsarhaldsrusk**

7.1 Skipanin fevnir um innsavning av gráum ruskposum við bústaðin.

7.2 Húski skulu hava stativ til gráa ruskposan.

7.3 Húski útvega og viðlíkahalda sjálvi stativini. Stativini skulu vera av góðkendum slag sambært *Fylgiskjali 2*.

7.4 Um meira enn eitt húski er í einum sethúsum, hava tey skyldu til at hava felags støðu. IR avgerð, um hús við fleiri íbúðum, raðhús og íbúðir í ávísum økjum skulu vera felags um eina ruskposastøðu ella ruskbingju. Viðkomandi íbúgvar og kommuna skulu kunnast og hoyrast, áðrenn støða verður tikin til at seta skipanina í verk.

7.5 IRF útvegar fyrstu ruskbingjuna, um so er, at íbúðirnar hava onnur íløt frammanundan. Eftir hetta og í øki við nýbygdum íbúðum, hevur eigari ella eigarfelag skyldu til at útveg góðkent ílat fyri egnan kostnað.

7.6 IRF kann taka avgerð um, at á ávísum ognum ella í ávísum bústaðarøkjum skulu bingjur nýtast í staðin fyri ruskposar. Viðkomandi íbúgvar og kommuna skulu kunnast og hoyras áðrenn skipanin verður sett í verk.

7.7 IRF heintar ein gráan ruskposa um vikuna frá hvørjum húski. IRF útflyggjar hvørjum hú ruskposar, svarandi til ein posa um vikuna. Ruskinnsavnararnir taka bert ruskposar við II áskrift. Tað er ikki loyvt at koyra annað í ruskposan enn tað, sum er fyriskrivað í *Fylgiskjali 1*.

7.8 IRF heintar tveir gráar ruskposar um vikuna frá húskjum, har tað eru 6 fólk ella fleiri og húskjum við serligum heilsuligum tørvi. Bý/bygdaráðini upplýsa IRF um hesi húski. Hev húskið fingið loyvi til at hava tveir posar, er eisini neyðugt at hava tvey stativ.

7.9 Ruskinnsavnararnir taka eisini gráar eykaposar við IRF áskrift frá húskjum.

7.10 Ruskposin verður í mest møguligan mun tikin sama dag hvørja viku.

7.11 Hundar ella onnur djór skulu á ongan hátt vera til ampa fyri ruskinnsavnaran.

7.12 Støða, vekt, flutningsteinur o.a. viðvíkjandi innsavning av húsarhaldsruski skulu í minsta lagi skipast samsvarandi galdandi tilmæli um ruskinnsavning frá Arbeiðseftirlitinum. IRI kann gera strangari reglur enn Arbeiðseftirlitið mælir til. Nærri reglur eru lýstar í *Fylgiskjali 3*.

**8. Innsavningarskipan til pappír**

8.1 Skipanin fevnir um innsavning av hvítum posum frá húskjum.

8.2 Hvíti posin stendur í stativi á somu støðu sum grái posin.